


Michael Moore, filmsframleiðari, gevur kapitalismuni sum hugsjón av grovfílini í filmi sínum frá 2009

tikkurin hjá Ronald Reagan, ið tók við forsetaembætinum í 1981.

Í filminum talar Ronald Reagan á keypsskálanum í Wall Street. Undir liðini á honum stendur ein maður, sum sambært Michael Moore líkist einum butlara. Hetta er nevndarformaðurin í risastóru fíggjarfyritøkuni, Merril Lynch. Navn hansara er Don Regan. Hann gjørdist seinni skrivstovustjóri í Hvítu Húsunum. Meðan Reagan talar, fara fólk at klappa, og í hesi løtu nærum skumpar Don Regan undir forsetan og biður hann skunda sær. Hvør biður amerikanska forsetan skunda sær, spyr Michael Moore speiskliga, og svarið er sjálvandi, at tað gera tey stóru kapitaláhugamálini.

Frá tí, at Ronald Reagan steig inn um gáttina í Hvítu Húsunum, varð USA stýrt sum ein fyritøka, sigur Michael Moore. Fakfeløgini skuldu oyðileggjast, milliónir mistu arbeiðið, og skatturin hjá teimum ríku varð kutaður niður í helvt. Reallønin lækkaði, og fólk máttu liva fyri læntar pengar. Sjúkratryggingarnar bara dýrkaðu. Alt hetta fekk tøl og kursir at fara til himmals á Wall Street, men hjá vanligum húsarhaldum vendu tølini skeivt, og fólk hava bara funnið seg í tí, suffar Michael Moore.

»Frælsa fyritakssemið er ikki gramni, útnytting og grov mistøk,« sigur George Bush einaferð í filminum. Tað er so rímiligt, er kapitalisman ikki akkurát tað, hugsar Michael Moore. Nei, tí George Bush heldur fram og sigur, at »um tú leitar eftir sosialum rættvísi og virðing, so er kapitalisman vegurin fram.« So langar Michael Moore fleiri dømir á borðið, ið vísa svartastu síðuna hjá kapitalismuni, m.a. dømið um eitt privat fongsul fyri ungfólk, ið fær sprenfult av almennum stuðli, og sum livir av at fáa so nógv ungfólk í fongsul sum gjørligt, sama um tey hava gjørt nakað skeivt ella ikki. Sjálvan dómaran hevur fongslið so mutrað fyri at fylla klivarnar.

## Pengar í teimum deyðu

Vilja vit hava fyrilitaleysa kapitalismu fram um rættarligt rættvísi, er spurningurin, vit skulu svara, tá vit hava hoyrt hesa søguna, og Michael Moore heldur so fram at leggja dømir á borðið. Hann vitjar inni hjá konu, sum misti mannin, tí maðurin doyði av krabbameini. Fyritøkan, sum maðurin arbeiddi hjá, hevði teknað eina trygging ímóti deyða hansara, og tá maðurin var farin, fekk fyritøkan eina klekkiliga upphædd útgoldna. Ein sakførari sigur í filminum, at við hesi skipan hevði fyritøkan í veruleikanum eitt ynski um, at maðurin doyði, tí so fekk hon pengar burtur úr tí.

Michael Moore situr eisini inni hjá manni og tveimum børnum, ið mistu mammuna, tá hon var einans 26 ára gomul. Hon starvaðist hjá Wal-Mart. Fyritøkan hevði tryggjað seg ímóti, at øll 350.000 starvsfólkini skuldu doyggja, og tá mamman doyði, fekk Wal-Mart útgoldið 81.000 dollarar í endurgjaldi, meðan familjan onki fekk. Greitt verður frá, at fyritøkur, sum á hendan hátt tryggja seg ímóti, at starvsfólkini doyggja, fáa mest burtur úr starvsfólkum, sum doyggja ung, tí tá er skaðin størstur og mest óvæntaður. »Dead Peasants« hava summar fyritøkur kallað tílík deyðsføll í innanhýsis skjølum.

Her er tað, at Michael Moore hálar prestin inn á pallin og kallar kapitalismuna synd og óndskap, tí hvussu djúpt kann hon søkka í síni jagstran eftir vinningi? Tá hevði Dr. Sachs, sum á sinni fann vaksinuna ímóti polio, helt øðrvísi samvitsku. Hann kravdi ikki at fáa patent upp á sína vaksinu, so hann kundi gerast ríkur. Hann hevði nóg mikið at liva av sum starvssettur granskari, og tá ein tíðindamaður spurdi, hvør átti patentið, svaraði hann, at har fanst onki patent, tí øll fólk í verðini áttu vaksinuna. Á sama hátt, sum ongin kundi eiga sólina, kundi ongin eiga vaksinuna persónliga, segði hann.

## Statskassin tømdur

Niðurstøðan hjá Michael Moore er, at tað var ein vanlukka, at alt eftirlit við fíggjarmarknaðinum í USA nærum varð avtikið, so Wall Street kundi sleppa at spæla sær so fyrilitaleyst, at korthúsið at enda rapaði. Men vitloysið steðgaði ikki tá. Tá veitslan var at enda komin, og bankar og fíggjarstovnar fóru á húsagang, fluttu fleiri týðandi persónar í risastóra íløgubankanum, Goldman Sachs, inn í amerikanska fíggjarmálaráðið, teirra millum fyrrverandi nevndarformaðurin, Henry Paulson, ið gjørdist fíggjarmálaráðharri. Innanífrá virkaðu hesir menn so fyri, at vinirnir uttanfyri fingu sínar almennu bjargingarpengar, heilar 700 milliardir dollarar at býta millum sín.

Størri rán er ikki framt ímóti amerikanska statskassanum í søguni, heldur Michael Moore, og tí gongur hann eisini í filminum í gøtunum í Washington og vil handtaka teir seku. Sjálvandi sleppur hann ikki á gátt nakrastaðni, men poengið er púra greitt, og um tað veruliga er so, at tey heilt fáu á hendan hátt so dyggiliga snýta tey flestu, at vesturlendsku búskapirnir eru um at gerast plutonomi og ikki demokrati, tí fólkaræðið einans er til fortreð hjá teimum stóru kapitaláhugamálunum, so er spurningurin, um ikki grundarlag er fyri politiskum flokkum, ið greitt tala søk teirra minni mentu í vesturheiminum. Í einum ríkmannaræði eru tey minni mentu jú nærum øll.